Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

## Blái Krossur søkir eftir fyribyrgingar ráðgeva

**Blái Krossur Føroya søkir eftir starvsfólki, at arbeiða við tiltøkum og verkætlanum innan rúsdrekka- og rúsevna fyribyrging at byrja 1. august 2007 ella eftir avtalu.**

**Starvið:**
Høvuðsuppgávan verður at undirvísa, ráðgeva, skipa fyri og menna tað fyribyrgjandi arbeiðið hjá Bláa Krossi.

**Førleikar/eginleikar:**
- tú hevur hóskandi útbúgving og royndir
- tú hevur áhuga og innlivingarevni í nýggj tiltøk
- tú ert álitisvekjandi og álítandi
- tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur kunnleika til vanlig telduforrit
- tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini
- tú ynskir at hjálpa børnum og ungum til eitt betri lív.

**Vit bjóða tær:**
Eitt áhugavert, sjálvstøðugt og spennandi fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum og eitt gott arbeiðsumhvørvi. Løn og endurgjald fyri ferðaútreiðslur eftir galdandi skipan.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til aðalskrivaran, Hjalmar Hansen, á tlf. 470 700 ella t-post: hjalmar@blakross.fo.

Umsókn við prógvum og viðmælum skal verða Bláa Krossi Føroya, Heiðavegur 6, 620 Runavík í hendi í seinasta lagi 18. juni 2007.

**Blái Krossur Føroya,** ið telur umleið 1500 limir og 8 staðbundin feløg, er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, ið arbeiðir við fyribyrging, umsorgan og hjálp til misnýtarar av rúsdrekka og rúsandi evnum. Les meira á www.blakross.fo

## LASTBILFØRARI

Søkt verður eftir førara til lastbil.

Talan er um støðugt arbeiðið.

**J & K Petersen Contractors**

J&K

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585001 · jkp@jkp.fo

Runavíkar Kommuna

søkir eftir

## Pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 2 barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari, 1 barnagarðsstova við 20 6-ára gomlum børnum og 1 stova við børnum við serligum tørvi.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnunum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

**Søkt verður eftir:**
- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðsstovu við 6-ára gomlum børnum
- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðsstovu
- pedagogum 30-35t um vikuna, til vøggustovurnar
- 1 pedagogi 30-35t um vikuna, til stovuna við børnum við serligum tørvi

Størvini verða sett 13. august 2007 ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss leiðara ella Jastrid Weihe varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 8 juni 2007, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará

## FØRARI TIL betongpumpubil

Søkt verður eftir førara til betongpumpubil.

Talan er um støðugt arbeiðið.

Teir, ið settir verða kunnu byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

**J & K Petersen Contractors**

J&K

P/F J & K Petersen · Á Hjalla · FO-188 Hoyvík
Tlf 315060 / 585025 · betong@jkp.fo

## Starvsfólk til: INTERSPORT Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta lærupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

## UMSÓKN UM SKEINKILOYVI TIL STØK TILTØK

Umsóknir um skeinkiloyvi til støk tiltøk í summar, eiga at verða Loyvisnevndini í hendi innan 8. juni 2007.

Umsóknir skulu sendast til:

**Politistøðin í Tórshavn**
Att. Loyvisnevndin
J. Broncksgøta 17
Postboks 3018
110 Tórshavn

Saman við umsókníni skal sendast ein tekning, sum vísir økið har ætlanin er at skeinkja, tal av skeinkingarstøðum, umframt ein neyv lýsing av tiltakinum, herundir upp- og afturlatingartíðir.

***Loyvisnevndin***
*Anna Dam, form.*

## Íbúð ella hús

Trúgvandi maður søknast eftir íbúð ella lítlum húsum í Vestmanna.

Vinarliga ringið á tlf. 21 29 69